FØROYA
ARBEIÐSGEVARAFELAG

# Ársfrásøgn

**Juni 2022**

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Innihaldsyvirlit


**Frágreiðing frá nevndini ..... 4**

**Farna árið við samráðingum og tiltøkum ..... 6**

Privati arbeiðsmarknaðurin ..... 6
- Samráðingarrundan 2020-2022 ..... 6
- Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk ..... 6
- Sáttmálin við Starvsfelagið fyri Posta ..... 6
- Samráðingarrundan 2022-2024 ..... 6
- Komandi sáttmálasamráðingar ..... 7
- Koronatilmælini avlýstu størru tiltøkini ..... 7

Vinnudagurin 2021 ..... 7
Formula Ársins Virki 2021 ..... 7
Thetis Vinnuátakið 2021 ..... 8
Serstøk viðurkenning til Debes og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna ..... 8
Ráðstevna um burðardygga bygging ..... 9
Ferðavinnustevnan 2021 ..... 9
Seafood Expo Global í Barcelona ..... 9
Aliráðstevnan 2022 ..... 9
Onnur tiltøk í farna ári ..... 10

**Farna árið í vinnuni og útlit ..... 11**

Tvey óvanlig ár ..... 11
Stórur vøkstur í heimliga eftirspurninginum ..... 11
Ferðavinnan rakti botnin í 2021 og er á veg uppaftur ..... 12
Eftirspurningurin uttanífrá komin fyri seg aftur ..... 14
Útlitini sera óviss í løtuni ..... 18

**Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag ..... 19**

Atgongd til skikkaða arbeiðsmegi ..... 19
Góðar og viðkomandi útbúgvingar- og granskingarskipanir ..... 19
Lægri lønarskatt ..... 19
Fiskivinnu- og handilsavtalur ..... 20
Langtíðarætlanir og haldføri í búskapin ..... 20
Broyta kappingaravlagandi skipanir ..... 20
Almennan eigarapolitikk ..... 20
Støðugan politikk og tryggar karmar ..... 20

**Føroya Arbeiðsgevarafelag ..... 21**

Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag ..... 21
Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag ..... 21
Stjóraskifti í Vinnuhúsinum ..... 22
Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag ..... 23
Vinnuhúsið ..... 25



# Frágreiðing frá nevndini



**Bogi Jacobsen**
Nevndarformaður

Heimurin er spakuliga latin upp aftur, so hvørt sum koronaavmarkingarnar eru linkaðar og strikaðar í flestu londunum um okkara leiðir hetta seinasta árið.

Gongd er komin á aftur ferðavinnuna, bæði tá ið tað snýr seg um fremmand ferðafólk, ið koma til landið, men eisini, tá ið tað snýr seg um føroyingar, sum fara av landinum at ferðast. Metstóri eftirspurningurin í heimligu handilsvinnuni, orsakað av koronatiltøkunum, hevur tí javnað seg aftur, og heimliga handilsvinnan er so smátt við at venda aftur til ein vanligan gerandisdag uttan koronaavmarkingar.

Annars hevur nógv virksemi verið í byggivinnuni og øðrum vinnum innanlands hesi seinastu tvey árini, hóast koronaavmarkingar, og avbjóðingin at útvega skikkaða arbeiðsmegi hevur tí alla tíðina verið ein av størstu avbjóðingunum hjá føroyskum arbeiðsgevarum fyri framhaldandi vøkstri. Nýggja fast-track skipanin, sum kom í gildi í november 2021, hevur hjálpt nakað um støðuna, men tørvurin á skikkaðari arbeiðsmegi má eisini loysast umvegis útbúgvingarskipanina.

Føroyskar útflutningsfyritøkur hava verið nógva tarnaðar av koronaavmarkingum uttanlands, og tað sást tí skjótt aftur í føroyska útflutninginum, tá koronatiltøkini úti í heimi vórðu linkaði. Eftirspurningurin eftir føroyskum vørum uttanífrá tók beinanvegin dik á seg, tá útlendsku matstovurnar byrjaðu at lata upp aftur. Føroyska útflutningsvirðið vaks við 20% frá 2020 til 2021 og hevur ongantíð verið størri enn í 2021, tá samlaða útflutningsvirðið fór upp um 10 mia. kr. Útflutta nøgdin vaks 3%.

Tað eru serliga prísirnir á laksi, sum hava sveiggjað



nógv hesi seinastu tvey árini, og laksaprísirnir geva eina góða mynd av, hvussu viðbrekin føroyski útflutningurin er, og hvussu stór sveiggj kunnu vera í føroyska útflutningsvirðinum. Undir koronakreppuni komu laksaprísirnir, í styttri tíðarskeiðum, heilt niður ímóti framleiðslukostnaðinum, men síðan hotel- og matstovuvinnan byrjaði at koma fyri seg aftur kring heimin, hava laksaprísirnir verið óvanliga høgir.

Hóast vit eru í holt við at leggja korona aftur um okkum, so fara vit at merkja eftirskjálvtar av korona tiltøkunum nakað fram í tíðina, samstundis sum heimurin hevur fingið aðrar avbjóðingar at stríðast við eftir russisku innrásina í Ukraina.

Støðan og útlitini eru tí meira óviss nú enn nakrantíð.

Fleiri havnir, serliga í fjareystri, hava verið læstar niður, og nógvar framleiðslur lógu stillar, tá koronasmittan gjørdi mest um seg. Hetta sæst nú aftur við vørumangli og skjótt vaksandi rávøru- og orkuprísum. Tað mangla ikki bert lidnar vørur, men eisini hálvlidnar vørur, og tí fara fløskuhálsar og hol í framleiðsluketunum, at skapa vørumangul og bíðitíðir eftir vørum av ymsum slag, nakað fram í tíðina.

Harumframt hava strongu tiltøkini mótvegis Russlandi, eftir innrásina í Ukraina, sett enn meiri ferð á prísvøksturin á serliga olju og gassi, og skjótt vaksandi inflasjónin er helst størsta hóttanin mótvegis heimsbúskapinum í løtuni. Fleiri greinarar meta tó, at inflasjónin er í hæddini og fer at hæsa av aftur seinni í hesum árinum, men óvissan og stóra inflasjónstrýstið seinastu tíðina settu sín dám á fyrstu samráðingarnar á arbeiðsmarknaðinum í hesi samráðingarrunduni.

Henda samráðingarrundan, fyri sáttmálaskeiðið 2022-2024, byrjaði í mars, tá Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðararfeløgini handaðu hvørjum øðrum sáttmálakrøv síni. Samráðingarnar millum partarnar endaðu í seming, og mikudagin 25. mai góðtóku partarnir eitt semingsuppskot um nýggjan tvey ára sáttmála, har avtalaðu lønarhækkingarnar eru hesar:

1. mai 2022 hækkar lønin 3,5%
1. mai 2023 hækkar lønin 3,5%

Umframt hækking í lønini eru broytingar gjørdar í starvsaldrinum, sum merkir, at samlaði karmurin hetta tvey ára sáttmálaskeiðið er 3,80% fyrra árið og 4,04% seinna árið.

Eftirskjálvtarnir av koronatiltøkunum fara at rætta seg sum frá líður, samstundis sum heimurin fer at tillaga seg ein nýggjan veruleika eftir kríggið í Ukraina. Hvussu leingi hetta fer taka, og hvussu nýggi veruleikin fer at síggja út, er stóri spurningurin í løtuni, men hetta fer heilt vist at skapa stórar avbjóðingar fyri føroysku uppsjóvarvinnuna seinni í hesum árinum, tá vertíðin byrjar, og fiskurin, sum vanliga er farin til Russlands og eystureftir, helst skal seljast á øðrum marknaðum. Í fjør svaraði útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski til 26% av samlaða føroyska útflutninginum av fiski og fiskavørum.

Ein niðurstøða er tó púra greið eftir russisku innrásina í Ukraina. Flestu stjórnarleiðarar í Evropa eru nú samdir um, at vesturheimurin skal gerast minni bundin av orku úr Russlandi, so skjótt tað á nakran hátt kann lata seg gera. Aðrir orkuveitarar skulu tí koma ístaðin fyri Russland, og tað hevur skund. Útlitini fyri føroysku kolvetnis- og frálandavinnuna eru tí øðrvísi nú enn fyri bert fáum mánaðum síðan, tá eingi útlit vóru fyri nøkrum kolvetnisvirksemi um okkara leiðir komandi árini.

Løgtingsval er á skránni um gott eitt ár, og valstríðið fer tí so smátt at kykna og seta sín dám á árið fyri framman. Føroya Arbeiðsgevarafelag og Vinnuhúsið ætla, aftur hesu ferð, at nýta høvið til at vísa á síni sjónarmið og koma við tilmælum til politikararnar, hvussu ein sunnur vinnupolitikkur eigur at verða lagdur tilrættis.

Burðardygd og varandi gagnnýtsla av tilfeingi er ein tvørgangandi fortreyt í øllum tilmælunum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Hetta merkir, at tilfeingið verður gagnnýtt soleiðis, at komandi ættarlið eisini hava møguleika at fáa gagn av tí tilfeingi, vit í dag hava at ráða yvir, og hesum eiga land og kommunur at taka atlit at, tá ið karmar fyri vinnuligum virksemi verða lagdir tilrættis.

Tórshavn, tann 23. juni 2022

**Bogi Jacobsen**
Nevndarformaður

# Farna árið við samráðingum og tiltøkum

**Føroya Arbeiðsgevarafelag brúkar nógva orku til samráðingar og ymsar spurningar um sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Soleiðis var eisini í undanfarna ári, har tað eisini eydnaðist at fáa fleiri tiltøk hjá feløgunum í Vinnuhúsinum á skránna aftur, so hvørt sum koronaavmarkingarnar linkaðu**

## Privati arbeiðsmarknaðurin

Føroya Arbeiðsgevarafelag, við undirfeløgum tess, varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri handilsskip. Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag.

Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja hesar støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

## Samráðingarrundan 2020-2022

Samráðingarrundan 2020–2022 byrjaði við samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini. Úrslitið var eitt 2 ára sáttmálaskeið galdandi frá 1. mai 2020 til 1. mai 2022.

Karmurin var 2,05% fyrra árið, har lønarhækkingin varð seinkað 3 mánaðir, soleiðis at lønarhækkingin bert var galdandi fyri 9 mánaðir, og 1,25% seinna árið, frá 1. mai 2021, sum helt í allari samráðingarrunduni.

Síðan seinastu ársfrágreiðing hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag eru semjur gjørdar um sáttmálarnar fyri Føroysk Miðlafólk og Starvsfelagið fyri Posta, og niðanfyri er ein stuttur samandráttur av úrslitunum av samráðingunum við hesi feløgini.

## Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk skrivaðu undir nýggjan tvey ára sáttmála tann 26. november. 1. februar 2022 hækkaði lønin við 2,05%, og 1. november 2023 hækkaði lønin við 1,25%.

Harumframt vóru aðrar broytingar og tillagingar í sáttmálanum.

## Sáttmálin við Starvsfelagið fyri Posta

Mikudagin tann 22. desember 2021 varð semja gjørd millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsfelagið fyri Posta. Talan var um ein eitt ára sáttmála við eini lønarhækking á 1,25% tann 1. januar 2022.

## Samráðingarrundan 2022–2024

Nýggja samráðingarrundan, fyri sáttmálaskeiðið 2022-2024, byrjaði í mars, tá partarnir handaðu hvørjum øðrum sáttmálakrøv síni.

Samráðingarnar millum partarnar endaðu í seming, og mikudagin 25. mai góðtóku partarnir eitt semingsuppskot um nýggjan tvey ára sáttmála, har avtalaðu lønarhækkingarnar eru hesar:

2. mai 2022 hækkar lønin 3,5%
2. mai 2023 hækkar lønin 3,5%

Umframt hækking í lønini eru broytingar gjørdar í starvsaldrinum, sum merkir, at samlaði karmurin hetta tvey ára sáttmálaskeiðið er 3,80% fyrra árið og 4,04% seinna árið.



## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, ið eftir eru at samráðast um í hesi samráðingarrunduni, ganga út sum víst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| 1. juni 2022 | Sáttmálin við Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar á landi |
| 1. okt 2022 | Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna |
| 1. okt 2022 | Sáttmálin við Føroya Flogteknikarafelag |
| 1. nov 2022 | Sáttmálin við Súluna |
| 1. jan 2023 | Sáttmálar við Starvsfelagið fyri starvsfólk á Føroya Tele og Posta |
| 1. jan 2023 | Sáttmálin við Starvsfelagið fyri sløkkiliðsfólk á Vága Floghavn |
| 1. mar 2023 | Sáttmálarnir við Skipara- og Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Fiski-mannafelagið um manningar í handilsflotanum |
| 1. apr 2023 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya |
| 1. mai 2023 | Sáttmálin við Samverk |
| 1. mai 2023 | Sáttmálin við Grafiska Yrkisfelagið |
| 1. mai 2023 | Sáttmálarnir við YTF og Finansforbundet |
| 1. juni 2023 | Sáttmálin við YTF um Elektron |
| 1. nov 2023 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk |
| 1. mai 2024 | Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út – Nýggj samráðingarrunda byrjar |




## Vinnudagurin 2021

Vinnuhúsið hevur skipað fyri árliga Vinnudegnum 21 ár út í eitt, við einum undantaki. Tað var í 2020, tá ið koronaavmarkingarnar høvdu við sær, at Vinnudagurin varð avlýstur, men í 2021 eydnaðist tað so aftur at fáa Vinnudagin á skrá.

Umframt fleiri áhugaverdar fyrilestrar, so vórðu Ársins Virki og Vinnuátakið kosin, og sum nakað serligt, so var eisini latin ein Serstøk Viðurkenning á Vinnudegnum 2021.

## Formula Ársins Virki 2021




Dómsnevndin grundgav m.a. soleiðis fyri at velja P/F Formula til Ársins Virki 2021.

Ársins Virki 2021 er ein KT-fyritøka, sum hevur eitt breitt úrval av KT-tænastum og útgerð, og sum bjóðar fram fleiri ymiskar KT-loysnir. Fyritøkan umboðar bæði loysnir, ið eru mentar av fyritøkuni sjálvari, og loysnir, sum eru mentar uttanfyri húsið.

Loysnir verða í størstan mun seldar í Føroyum, men sølan uttanlands hevur verið vaksandi seinnu árini. Serliga í norðurlondum, men eisini aðra staðni í Evropa. Harumframt hevur fyritøkan í fleiri áratíggju saman við útlendskum tøkniveitara útvegað og serviserað tøkniligar loysnir til føroysku ali- og fiskaframleiðsluna. Somuleiðis hevur hon hjálpt hesum fyritøkum í teirra útrás, tá hesar eru farnar útum landoddarnar við sínum virksemi.

Seinnu árini hevur stórt fokus verið á at menna sjálvsavgreiðsluloysnir fyri borgarar og viðskiftafólk, og fyritøkan hevur bjóðað seg fram at hjálpa at menna og seta hesar í verk. Økta fokusið á privatlívið hjá KT-brúkarunum og nýggju GDPR-reglurnar hevur eisini verið eitt fokusøki hjá fyritøkuni í seinastuni.

Fyritøkan er ein av størstu KT-fyritøkunum í landinum við knapt 100 starvsfólkum, sum starvast á deildum ymsastaðni í Føroyum og í Danmark. Fyritøkan hevur seinni árini haft góð fíggjarlig úrslit og hevur havt eitt vaksandi eginpeningsavkast og økjandi vinningsføri.

Fyritøkan hevur eisini ein tilvitaðan sosialan profil, har hon m.a. rættir eina hjálpandi hond til tey, sum ikki fingu alt frá byrjan. Eitt nú hevur fyritøkan samstarvað við Almannaverkið um at taka inn fólk og geva teimum arbeiðsroyndir, so hesi fáa møguleika at finna sítt pláss í samfelagnum.

Fyritøkan hevur eisini havt ein týðandi leiklut í nýggju KT-breytini á Nám X, har starvsfólk hjá fyritøkuni hava undirvíst næmingunum fyrstu tvey árini, breytin

hevur verið til. Harumframt hevur hon útvegað útgerð til útbúgvingina. Fyritøkan hjálpir eisini lesandi við at geva teimum praktikpláss ella geva teimum møguleika at skriva uppgávur undir lesnaðinum.

Fyritøkan er tilvitað um sína ávirkan á umhvørvið, eitt nú verða tónarar og KT-útgerð, sum verður tikin niður, sent til endurnýtslu, og fyritøkan samstarvar við veitarar, sum menna grønar loysnir.

Við støði í teimum flottu fíggjarligu úrslitunum og tí denti, sum verður lagdur á sosiala og umhvørvisliga burðardygd, hevur ein samd dómsnevnd valt P/F Formula sum Ársins Virki 2021.

## Thetis Vinnuátakið 2021

Dómsnevndin grundgav m.a. soleiðis fyri at velja Thetis til Vinnuátakið 2021.

Fyritøkan handan Vinnuátakið 2021 hevur fingið navn eftir eitt av teimum skipunum, sum Nólsoyar Páll førdi millum Danmark og Føroya við vøru fá ár áðrenn, hann førdi koppsetingina til Føroya. Eins og Nólsoyar Páll neyvan hevði ímyndað sær, at hann skuldi fáa ein týðandi leiklut í at berja niður pokurnar í Føroyum, kom tað helst óvart á fyritøkuna handan Vinnuátakið, at hon skuldi fáa ein týðandi leiklut í bardaganum móti koronafarsóttini. Hon var í veruleikanum stovnað við heilt øðrum endamáli.




Meðan bíðað hevur verið eftir almenna føroyska koronapassinum, menti fyritøkan uppá lutfalsliga stutta tíð eina skipan við talgildum koronapassi. Fyritøkan hevur útskrivað uml. 3.800 koronapass, sum hevur verið ein stór hjálp hjá føroyingum, ið ferðast uttanlands, ikki minst teimum, sum ferðast í arbeiðsørindum.

Virksemið hjá fyritøkuni hevur eisini skapt áhuga uttanlands, og í seinnu helvt av 2020 fór fyritøkan í granskingarsamstarv við Pfizer, har fyritøkan fekk fígging til at menna koppsetingarevni. Skjótu svartíðirnar hava eisini skapt áhuga hjá Synlab, sum ger korunukanningar fyri UEFA. Fyritøkan er nú offisiellur partnari hjá Synlab.

Fyritøkan er eisini byrjað at innflyta testútgerð beinleiðis frá framleiðaranum, og hetta hevur lækkað prísin munandi á slíkari útgerð, ikki bara fyri fyritøkuna, men eisini aðrar aktørar í Føroyum, sum nýta slíka útgerð.

Dómsnevndin hevur í sínum vali av Vinnuátakinum 2021 lagt dent á tann samfelagsliga og vinnuliga týdning, sum økti testkapasiteturin og óvanliga skjótu svartíðirnar hava havt við sær. Tað hevur havt ein avgerandi leiklut fyri, at vit hava kunnað fingið ein so vanligan gerandisdag, sum vit hóast alt hava havt í Føroyum í hesi óvanligu støðu. Serliga í tíðini, meðan vit bíðaðu eftir koppsetingarevni úr útlandinum. Fyri útflutningsvinnuna hevur tað verið altavgerandi, at fyritøkan hevur kunnað komið út til fyritøkurnar og gjørt regluligar kanningar av starvsfólkunum, so framleiðslan og útflutningurin vórðu órógvað minst møguligt.

Ein samd dómsnevnd hevur valt koronukanningarnar hjá kanningarstovuni Thetis sum Vinnuátakið 2021.

## Serstøk viðurkenning til Debes og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna

Dómsnevndin, sum velur Ársins Virki og Vinnuátakið, ynskti í fjør at geva eina serstaka viðurkenning til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna v/ Debes H. Christiansen, fyri tað megnar arbeiðið, sum varð gjørt í sambandi við koronafarsóttina.




Áðrenn nakar í Føroyum gav sær stórvegis far um eina lúrandi heimsfarsótt fyrireikaði Debes, saman við øðrum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, seg til at vera klár, um tað gjørdist neyðugt. Og vit mugu bara staðfesta, at tað gjørdist neyðugt.

Tað munnu verða fáir føroyingar, sum ikki hava hoyrt søguna um, hvussu royndirnar við at greina laksasjúkuna ILA vórðu nýttar sum grundarlag fyri at greina koronukanningar, tá farsóttin av fyrstan tíð rakti.

Debes arbeiddi saman við øðrum á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, nátt og dag, at greina kanningar, og var arbeiði teirra eitt av týdningarmiklastu stigunum í bardaganum móti koronafarsóttini her á landi. Henda

eldhuga og hetta nærlagni hevur dómsnevndin valt at heiðra við einari serstakari viðurkenning.

## Ráðstevna um burðardygga bygging

Í november 2021 skipaðu feløg í Vinnuhúsinum fyri fyrstu ráðstevnuni í Føroyum um burðardygga bygging. Ráðstevnan varð hildin á Hotel Hilton í Havn, og framúr góða undirtøkan gav ein greiða ábending um, at tørvur er á fleiri slíkum tiltøkum í Føroyum.




## Ferðavinnustevnan 2021

Í november 2021 skipaði Ferðavinnufelagið eisini fyri ferðavinnustevnu, har evnið var vinnuferðavinna. Nógv fólk vóru til ferðavinnustevnuna, sum varð hildin á Hotel Føroyum. Á skránni vóru fyrilestrar, kjak og heiðursbrævahandan.



## Seafood Expo Global í Barcelona

Heimsins størsta fiskavørumessa, Seafood Expo Global var hildin í døgunum 26.-28. Apríl 2022, eftir at hava verið avlýst í tvey ár á rað orsakað av korona. Føroyskir fiskaútflytarar og undirveitarar teirra vóru eisini í ár væl umboðaðir á fiskavørumessuni.

Messan varð í ár flutt úr Brussel til Barcelona, tí messan varð vorðin ov stór til umstøðurnar í Brussel. Føroyski landabásurin var í ár víðkaður til 308 fermetrar, sum er tað størsta, hann nakrantíð hevur verið, so leingi Vinnuhúsið hevur samskipað básin.




Føroyskur landabásur hevur verið á Seafood Expo Global, síðani messan var fyrstu ferð fyrst í 1990-árunum. Tá var tað ein lítil messa í Brussel. Fyrstu tíðina samskipaði Menningarstovan føroysku messu luttøkuna, men seinni árini hevur Vinnuhúsið samskipað føroyska landabásin. Básurin hevði hesaferð fingið nýtt snið, og básurin fekk nógv rós fyri nýggja sniðið.

## Aliráðstevnan 2022

Umleið 370 fólk luttóku á árligu Aliráðstevnuni, ið varð hildin á Hotel Føroyum fríggjadagin 20. mai. Hetta vóru, sum vanligt, fólk frá alivinnnuni, fólk frá granskingarstovnum, fólk frá undirveitarum og fólk frá almennum myndugleikum.

Á skránni vóru framløgur um gongdina í føroysku alivinnuni og aðrar framløgur, sum viðgjørdu evni av bæði almennum og fakligum slag. Eisini nýttu fólk høvið at netverka. Flestu framløgurnar eru tøkar á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum.



## Onnur tiltøk í farna ári

Føroya Arbeiðsgevarafelag og feløgini í Vinnuhúsinum hava harumframt skipað fyri fleiri øðrum tiltøkum síðan aðalfundin í fjør, t.d. kunningarfundi um nýggju fast-track skipanina og kunningartiltaki fyri ukrainsk flóttafólk um føroyska arbeiðsmarknaðin.

Eisini er ein røð av tiltøkum sett á skrá, sum snúgva seg um at skipa arbeiðið við burðardygd í fyritøkum. Tvey tey fyrstu, um strategi fyri burðardygd og stýring av handfaring av burturkasti, eru longu hildin, og tvey onnur verða á skrá í seinna hálvári.

Meira fæst at vita um ymsu tiltøkini í nevndar-frásøgnunum hjá einstøku vinnugreinafeløgunum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

# Farna árið í vinnuni og útlit

**Metstóri eftirspurningurin í heimliga búskapinum orsakað av korona-avmarkingunum at ferðast uttanlands, hevur javnað seg aftur, samstundis sum ferðavinnan og eftirspurningurin uttanífrá eru komin fyri seg aftur, men avleiðingarnar av mongu koronastongslunum úti í heimi skapa stóra avbjóðingar við vørumangli og skjótt vaksandi inflasjón, har russiska innrásin í Ukraina hevur lagt stein omaná byrðu við størri óvissu enn nakrantíð um framtíðarútlitini**

## Tvey óvanlig ár

Hesi seinastu tvey árini hava verið tvey óvanlig ár fyri vinnuna, bæði í Føroyum og aðrastaðni. Tá vit komu inn í 2020 væntaðu tey flestu, at framgongdin og vøksturin, sum hevði verið árini frammanundan, fór at halda fram í 2020, men so var ikki, tí vit vóru bert komin stutt inn í 2020, tá koronafarsóttin og tiltøkini at forða smittuni at spjaða seg vendu øllum forsøgnunum á høvdið.

Fyrstu forsøgnirnar um avleiðingarnar fyri heimsbúskapin av strongu koronatiltøkunum, sum læstu stórar partar av vinnuni niður kring allan heimin, vóru rættiliga svartskygdar, men gongdin hevur í fleiri førum víst seg at verið øðrvísi, enn spádómarnir í fyrstu forsøgnunum um grækarismessu tíð í 2020. Samanumtikið hevur hetta tíðarskeiðið verið merkt av stórari óvissu, sum nú er størri enn nakrantíð.

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu avleiðingarnar av koronatiltøkunum hava rakt føroysku vinnuna. Í nøkrum vinnugreinum varð teppið skrykt undan inntøkugrundarlagnum, sum hvarv yvir nátt. Í øðrum vinnugreinum er eftirspurningurin øktur munandi undir koronatiltøkunum, meðan aftur aðrar ikki hava merkt stórvegis avleiðingar av tiltøkunum.

## Stórur vøkstur í heimliga eftirspurninginum

Eftir at fyrsti koronaskelkurin hevði lagt seg á vári 2020, tók heimligi eftirspurningurin rættiliga dik á seg. Nógvir pengar vóru í samfelagnum, og hjálparpakkarnir tóku broddin av ringastu avleiðingunum av korontiltøkunum. Eftirspurningurin og keypsmynstrið fluttu seg tí til heimliga marknaðin, tá føroyingar brádliga ikki sluppu av landinum við pengunum, teir høvdu sett av at ferðast fyri.

**Handilsvinna**

Umsetningurin hjá føroyskum handlum av klæðum og skóm var 20% hægri síðsta ársfjórðingi í 2020 enn sama tíðarskeið í 2019. Fyri húsbúnað og húsarhaldsvørur var umsetningurin 15% hægri, og fyri mat- og alkoholfríar drykkjuvørur var umsetningurin 11% hægri síðsta ársfjórðing 2020 samanborið við sama ársfjórðing árið fyri[1].

*„...tillagingin í heimligu handilsvinnuni sást longu aftur í síðsta ársfjórðingi í 2021."*

Vøksturin í umsetninginum í føroysku handilsvinnuni í 2020 og 2021 er tí fyri stóran part grundaður á óvanligar umstøður. Hesar umstøður og fortreytir fyri vøkstri, javna seg aftur, so hvørt koronaavmarkingarnar verða strikaðar og londini lata upp aftur fyri ferðafólki. Henda tillagingin í heimligu handilsvinnuni sást longu aftur í síðsta ársfjórðingi í 2021.

Jólasølan 2021 var nakað lakari enn jólasølan í 2020, men tað komst eisini av fleiri avlýsingum av jólaborðhaldum og øðrum tiltøkum, sum vanliga eru í desember, tí ein nýggj smittubylgja hevði tikið seg upp aftur í november 2021.

Sølan av klæðum og skóm lækkaði 8% í 4. ársfjórðingi 2021 samanborið við sama ársfjórðing 2020. Fyri húsbúnað og húsarhaldsvørur var sølan 1% lægri, og fyri mat- og alkoholfríar drykkjuvørur lækkaði sølan 2% frá 4. ársfjórðingi 2020 til 4. ársfjórðing 2021[2].

Meira fæst at vita um føroysku handilsvinnuna í ársfrásøgnini hjá Handilsvinnufelagnum, undir

[1] *Hagstova Føroya: Smásøluvísitøl 26. mars 2021.*
[2] *Hagstova Føroya: Smásøluvísitøl 30. mars 2022.*

vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

**Byggivinna**
Tað hevur verið stórt trýst á føroysku byggivinnuni seinastu árini, og tað sæst aftur í lønargjaldingunum og løntakaratalinum í byggivinnuni. Lønargjaldingarnar meira enn tvífaldaðust frá 2013 til 2020, tá árligi vøksturin í lønargjaldingunum í byggivinnuni vendi til eina afturgongd á 5%, sum svarar til á leið sama støði sum í 2019, sí mynd 1.

**Mynd 1: Lønargjaldingar í byggivinnuni, 2010-2021**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Henda gongdin sæst eisini aftur í løntakaratalinum í byggivinnuni. Her var árligi vøksturin størstur í 2017, tá løntakaratalið vaks við 14%. Í 2018 og 2019 var árligi vøksturin 12 og 5%. Í 2020 var vøksturin í løntakartalinum í byggivinnuni komin niður á 2%, har tað, stórt sæð, var liggjandi í 2021, sí mynd 2.

**Mynd 2: Løntakarar í byggivinnuni, 2010-2021**




*Kelda: Hagstova Føroya.*



*„...mangul á rávøru og útbúnaði er vorðin ein avmarking fyri virksemið í byggivinnuni."*

Sambært nýggjastu uppgerðunum[3] so benda hagtølini á, at lønargjaldingarnar og løntakaratalið í byggivinnuni ikki minka longur.

Størsta avmarkingin fyri framleiðsluna í byggivinnuni er framvegis mangul uppá skikkaða arbeiðsmegi, tí øll ES londini spyrja eftir somu arbeiðsmegi, sum Føroyar eftirspyrja. Hol í framleiðsluni og langar veitingartíðir í kjalarvørrinum av koronatiltøkunum, gera tað harumframt trupult at planleggja arbeiði og at fáa fatur á eitt nú eykalutum til maskinur.

Fyri fyrstu ferð í nógv ár er mangul á rávøru og útbúnaði vorðin ein avmarking fyri virksemið í byggivinnuni.

Meira fæst at vita um føroysku byggi- og handverkaravinnurnar í ársfrásøgnini hjá Føroya Handverksmeistarafelag á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

**Ráðgeving, tænastur og annar ídnaður**
Føroyskir byggiharrar eru dugnaligir at brúka føroyskar ráðgevar, og tí hevur nógva virksemið í byggivinnuni, hesi seinastu árini, skapt stóran vøkstur og menning í føroysku ráðgevaravinnuni. Ráðgevaravinnan hevur ikki verið so hart rakt av korona, tí fólk hava havt møguleika at sitið heima og arbeitt umvegis t.d. Teams, sum hevur givið ráðgeveravinnuni nýggjar møguleikar við uppgávum uttanfyri Føroyar.

*„...ráðgevaravinnan stóran týdning fyri burðardygga grøna menning..."*

Ráðgevaravinnan er ein vitanarvinna, og ráðgevaravinnan hevur tí stóran týdning fyri menningina av føroyska samfelagnum, ikki minst, tá ið tað snýr seg um burðardygd og grønu menningina av føroyska samfelagnum, sum framvegis er á byrjunarstøði. Her kunnu eisini vera stórir møguleikar hjá føroyingum, ið hava útbúgvið seg uttanlands og ætla sær at flyta heim aftur.

Meira fæst at vita um føroysku ráðgevaravinnuna í Ráðgevarablaðnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

[3] *Hagstova Føroya: Lønargjaldingar og løntakarar 19. apríl og 11.mai 2022.*

Føroyska KT-vinnan hevur verið í stórum vøkstri seinastu árini. Føroyar stevna inn í eina talgilda framtíð, har tøknin verður ein alt meira sjónligur partur av gerandisdegnum. Eftirspurningurin eftir KT-tænastum er tí nógv øktur og fer at økjast enn meira frameftir. Fortreytirnar fyri, at føroyska samfelagið skal fáa ágóðan av talgildingini er, at uppgávurnar verða bodnar út millum føroyskar fyritøkur, soleiðis at førleikarnir at viðlíkahalda talgilda infrakervið eisini eru í Føroyum í framtíðini.

Meira fæst at vita um føroysku KT-vinnuna, undir vinnugreinafeløg, á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Føroyska samskiftisvinnan hevur merkt støðugt og vaksandi virksemi og framgongd hesi seinastu árini, bæði her heima og uttanlands. Koronafarsóttin ávirkaði gongdina. Prentuppgávur minkaðu munandi, og tiltøk, so sum messur, vórðu púrasta avlýst. Samstundis vaks eftirspurningurin eftir online loysnum. Samskiftisvinnan var skjót at tillaga seg og er komin rímiliga heilskapað ígjøgnum hetta serstaka árið.

Meira fæst at vita um føroysku samskiftisvinnuna, undir "Vinnugreinafeløg", á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Annars er føroyskur ídnaður eyðkendur við einari ella fáum fyritøkum av sama slagi, t.d. matvøruframleiðarum, bryggjaríum, prentsmiðjum og framleiðarum av reingerðarevnum. Felags fyri framleiðsluna hjá føroyskum ídnaðarfyritøkum er, at tær virka í stórari og mangan ójavnari kapping við útlendskar framleiðarar, tí hesir hava í fleiri førum fría atgongd til føroyska marknaðinum, samstundis sum somu føroysk framleiddu vørurnar kunnu verða álagdar ymisk avgjøld, tá ið tær skulu seljast á marknaðunum í grannalondum okkara.

Føroysk vinna saknar tí neyðug átøk frá politisku myndugleikunum at tryggja javnbjóðis kapping millum føroyska og útlendska vinnu.

## Ferðavinnan rakti botnin í 2021 og er á veg uppaftur

Koronastøðan hevur verið serstakliga óheppin hjá føroysku ferðavinnuni, ikki minst tí at tvífaldaður gistingarkapasitetur stóð klárar at verða tikin í brúk í 2020. Nýggjar flogrutur úr Stóra Bretlandi og USA skuldu byrja, og nýggir vinnuspírar stóðu klárir kring landið at taka ímóti gestum.

Koronatiltøkini vóru tí ein dyggur smeitur fyri føroysku ferðavinnuna, men nú vísa hagtølini, at bratta niðurgongdin í 2020 rakti botnin í 2021, tá niðurgongdin vendi til eina næstan líka bratta gongd upp aftur, sí mynd 3 og 4. Ferðavinnan væntar at koma aftur á 2019 støði longu í ár ella í seinasta lagi í 2023.

Í 2020 fóru næstan 180.000 ferðafólk um flogvøllin í Vágunum. Hetta eru 58% færri enn í 2019, tá 424.000 ferðafólk fóru um flogvøllin. Fyrstu fimm mánaðirnar í ár fóru gott 129.000 ferðafólk um flogvøllin í Vágunum. Hetta eru meira enn tíggjar ferðir fleiri enn somu tíð í fjør, og á leið tað sama sum fyrstu fimm mánaðirnar í 2018, sí mynd 3.

Ferðafólkastreymurin gongur báðar vegir og tað eru ikki bert frítíðargestir, sum ferðast, men skjóti vøksturin í ferðafólkatølunum um flogvøllin vísir, at ferðafólkatalið veksur skjótt aftur í kjalarvørrinum av, at koronaavmarkingar eru strikaðar.



**Mynd 3: Ferðafólk um flogvøllin, januar-mai, 2011-2022.**




*Kelda: Vága Floghavn.*

Bruttovirðisøkingin frá ferðafólkum fór úr 165 mió. kr. í 2011 upp í 421 mió. kr. í 2019, og ferðavinnan væntaði, at bruttovirðisøkingin fór at nærkast einari hálvari milliard í 2020, men inntøkurnar frá útlendsku ferðafólkunum fóru beint tann øvugta vegin. Bruttovirðisøkingin í ferðavinnuni minkaði úr 421 mió. kr. í 2019 niður í 123 mió. kr. í 2020. Hetta svarar til eina afturgongd á 70%. Í 2021 kom bruttovirðisøkingin í ferðavinnuni upp aftur á 214 mió. kr., sí mynd 4.

**Mynd 4: Bruttovirðisøking frá útlendskum ferðafólkum, 2011-2021.**




*Kelda: Visit Faroeislands - Ársfrásøgn 2021*

## Eftirspurningurin uttanífrá komin fyri seg aftur

Frá 2010 til 2017 var ein javnur vøkstur í føroyska útflutningsvirðinum, men síðan 2017 hava tað verið stór sveiggj í føroyska útflutningsvirðinum. Nógv tann størsti parturin av føroyska vøruútflutninginum er fiskur og fiskavørur, sí mynd 5.

**Mynd 5: Føroyski vøruútflutningurin, 2010-2021.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í 2018 minkaði útflutningsvirðið á fiski og fiskavørum umleið 900 mió. kr., úr 8,4 mia. kr. niður á 7,5 mia. kr. Í 2019 vaks útflutningsvirðið á fiskavørunum aftur við næstan 1,5 mia. kr., upp í 8,9 mia. kr., fyri síðan at minka aftur 1,2 mia. kr., niður á 7,7 mia. kr. í 2020.

Í 2021 vaks útflutningurin av fiski og fiskavørum aftur upp í 9,3 mia. kr. Hetta er ein vøkstur á 1,5 mia. kr., og føroyska útflutningsvirðið hevur ongantíð verið størri enn í 2021, tá vøksturin í føroyska útflutningsvirðinum var 20%, og samlaða útflutningsvirðið fór upp um 10 mia. kr. Útflutta nøgdin vaks 3%.

**Mynd 6: Føroyskur fiskaútflutningur, 2015-2021.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í 2021 var tað serliga útflutningurin av laksi, sum gjørdi stóran mun í vøkstrinum í útflutningsvirðinum, sí mynd 6. Í 2021 var vøksturin í útflutningsvirðinum á laksi 1,2 mia. kr. ella 36%. Vøksturin í útflutnings-virðinum á uppsjóvarfiski var 10%, og vøksturin í útflutningsvirðinum á botnfiski, toski, hýsu og upsa, var 4%.

**Laksur**
Gongdin í laksaprísunum seinastu árini geva eina góða mynd av, hvussu stór og ógvislig sveiggj kunnu vera í laksaprísunum og føroyska útflutningsvirðinum, sum heild, og yvir stutta tíð. Tá koronasmittan fór at gera um seg í 2020 og umfatandi tiltøk vórðu sett í verk fyri at forða smittuni at spjaða seg, minkaði eftirspurningurin eftir laksi munandi. Laksaprísirnir fullu nógv og komu í fleiri førum heilt niður ímóti framleiðslukostnaðinum hetta tíðarskeiðið, tá koronatiltøkini læstu virksemið á gistingarhúsum og matstovum niður.

*„Laksaprísirnir fara væntandi at vera lutfalsliga høgir restina av árinum."*

Í kjalarvørrinum av, at gistingar- og matstovuvirksemið er komið fyri seg aftur, so hvørt koronatiltøkini eru linkað, er eftirspurningurin eftir laksi hækkaður skjótt aftur. Higartil í ár hava laksaprísirnir verið óvanliga høgir, og hóast teir fella nakað, verður væntað, at prísirnir fara at vera lutfalsliga høgir restina av árinum, tí væntandi verður eingin vøkstur í útboðnum av laksi fyri alt árið samanlagt.

Sambært metingum hjá greiningarfyritøkuni Kontali var tøkan av laksi umleið 6,7% minni og laksaprísirnir góð 47% hægri fyrsta ársfjórðing í ár samanborin við sama ársfjórðing í fjør. Kontali metir, at samanlagt fer altjóða útboðið av laksi at minka 7% fyrra hálvár í ár. Fyri alt árið í ár fer útboðið væntandi at minka 1% í mun til í fjør, tá eru goymslubroytingar eisini tiknar við.

Seinastu árini hevur føroyskur havbúnaður staðið fyri slakari helvt av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann størsta einstaka útflutningsvøran úr Føroyum. Frá 2014 til 2019 lá virðið á laksaútflutninginum millum 45 og 48% av samlaða fiskavøurútflutninginum, men í 2020 minkaði útflutningsvirðið á laksi niður í 43% av samlaða fiskavøruútflutninginum, úr góðum 4 mia. kr. í 2019 niður í 3,3 mia. kr. Í 2021 kom útflutningsvirðið á laksi upp á 4,5 mia. kr., svarandi til 48% av samlaða fiskavøruútflutninginum.

Føroysku alifyritøkurnar hava roynt at spjatt útflutningin landafrøðiliga hesi seinastu árini. Nógv tann størsti parturin av laksaútflutninginum er farin til teir fýra stóru høvuðsmarknaðirnar ES, USA, Russland og Kina, men trupulleikar við flutningi til fjarskotnar marknaðir undir koronafarsóttini hevur havt við sær, at ein lutfalsliga størri partur er útfluttur til ES hesa tíðina. Stutt eftir russisku innrásina í Ukraina steðgaði føroyski laksaútflutningurin til Russlands.



Meira fæst at vita um føroyska havbúnaðin í ársfrásøgnini 2021 hjá Havbúnaðarfelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

**Botnfiskur**
Útflutningsvirðið av mest vanligu botnfiskasløgunum toski, hýsu og upsa minkaði eitt lítið vet frá 2020 til 2021, sí mynd 6. Hóast hægri prísir, so minkaðu útfluttu nøgdirnar samsvarandi, og tí var útflutningsvirðið næstan óbroytt. Árið í fjør var framvegis nakað merkt av koronaavmarkingum í Evropa, men í nógv minni mun enn í 2020.

*„Í løtuni er størsti trupulleikin í føroysku botnfiskavinnuni manglandi rávøra"*

Í løtuni er størsti trupulleikin í føroysku botnfiskavinnuni manglandi rávøra, og støðan hevur neyvan nakrantíð verið so ring sum nú. Avreiðingarnar av toski undan Føroyum vóru umleið 5.000 tons fjør, og hetta er minsta úrtøkan av toski frá føroyskum havøki í nýggjari tíð. Samstundis er innflutningurin av rávøru vaksin munandi, og tað er orsøkin til, at útflutningurin av botnfiskavørum ikki minkaður líka nógv sum fiskiskapurin.

Botnfiskavinnan hevur seinastu árini roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku til at tryggja



føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd. Tað er neyðugt at arbeiða við at betra um atgongdina á so nógvum av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur sum gjørligt, so tað ber til at selja aðrastaðni, tá umstøðurnar á einum marknaði gerast truplari.

Brexit hevur gjørt tað truplari at útflyta til og umvegis bretska marknaðin. Tað tykist sum bretskir myndugleikar hava ásannað hetta, tí teir hava fyribils slept krøvum um innflutning umvegis marknaeftirlitsstøðir, heilsuváttanir og fysiska eftirkanning av vørum, sum skuldu setast í gildi í seinnu helvt av 2022.

Meira fæst at vita um gongdina í botnfiskaframleiðsluni í ársfrásøgnini 2021 hjá Ráfiskarakeyparafelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

**Uppsjóvarfiskur**
Í árunum frá 2010 til 2021 er útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski trífaldað, úr 826 mió. kr. í 2010 upp í 2,4 mia. kr. í 2021. Í sama tíðarskeiði hevur árliga útflutningsvirðið á botnfiski í miðal ligið um 1,2 mia. kr.

Uppsjóvarfiskur er tí vorðin ein alsamt meiri týðandi partur av føroysku útflutningsinntøkunum. Í fjør vóru útflutningsinntøkurnar frá uppsjóvarfiski næstan dupult so stórar sum útflutningsinntøkurnar frá botnfiski, sí mynd 7. Brádliga fallið í útflutningsvirðinum á uppsjóvarfiski í 2018 kemst av stóra eldsbrunanum á sumri 2017, tá ið virkið hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri brann í grund. Virksemið hjá Varðanum Pelagic lá tí stilt heilt fram til heystið 2018.

Eftir ein stóran vøkstur í 2019, minkaði útflutningsvirðið á uppsjóvarfiski aftur í 2020. Korona var helst ein partur av orsøkini, men størsta orsøkin til fallið í útflutningsvirðinum var helst manglandi atgongd at fiska í fremmandum sjógvi. Føroyar mistu atgongdina til bretskan sjógv, tá ið Brexit gjørdist veruleiki, og føroysku uppsjóvarskipini mugu tí fiska kvoturnar í føroyskum sjógvi, ístaðin fyri bretskum sjógvi. Hetta hevur avleiðingar fyri prísin á t.d. makreli, sum hevur nógv hægri prís, tá ið hann hevur etið seg feitan í føroyskum sjógvi og flutt seg yvir í bretskan sjógv.

**Mynd 7: Útflutningsvirði á botnfiski og uppsjóvarfiski, 2010-2021.**




*Kelda: Hagstova Føroya.*

Í løtuni eru lítil útlit fyri, at nøkur fiskiveiðuavtala verður gjørd við Stórabretland í bræði, men hetta er neyvan størsta avbjóðingin hjá uppsjóvarvinnuni í løtuni. Nógv tann størsti parturin av útflutninginum av uppsjóvarfiski er farin til Russlands og Eysturevropa.

*„ ... stór óvissa um útflutningin og útflutningsmarknaðirnar hjá uppsjóvarvinnuni."*

Eftir russisku innrásina í Ukraina, 24. februar í ár, valdar stór óvissa um útflutningin og útflutningsmarknaðirnar hjá uppsjóvarvinnuni. Marknaðarviðurskiftini fara heilt vist at broytast, møguliga verður ein størri partur útfluttur til Egyptaland og Afrika, men hvussu marknaðarsamansetingin og prísirnir fara at verða, fæst ikki at vita fyrr enn eftir august í ár, tá ið vertíðin hjá uppsjóvarvinnuni eftir makreli er byrjað.

Meira fæst at vita um føroysku uppsjóvarvinnuna á heimasíðuni hjá Felagnum Nótaskip, www.notaskip.fo

**Shipping og frálandavinna**

Føroyska virksemið á sjónum snýr seg ikki bert um fiskivinnu. Føroysku shipping- og frálandavinnurnar umboða eisini virksemi á sjónum, sum hevur stóran týdning fyri føroyska samfelagsbúskapin.

Fyrst í hesum árinum vóru í alt 1.551 starvsfólk knýtt at shippingvinnuni, bæði á sjógvi og á landi. 1.229 sjófólk vóru umborð á skipum undir Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og 322 starvsfólk arbeiddu á landi.

Føroyska shippingvinnan er fyri stóran part ein altjóða vinna, har eftirspurningurin er tætt knýttur at gongdini í altjóða konjunkturunum.

*„ ... flutningsmarknaðurin ikki so hart raktur av koronaavleiðingunum, tí tørvurin at flyta góðs kring heimin er ikki broyttur."*

Hóast flutningsvinnan er merkt av vaksandi oljuprísum, fløskuhálsum í veitingarkervinum og skerdari atgongd til ávísar havnir og lond orsakað av koronatiltøkum, so er altjóða flutningsmarknaðurin samanumtikið ikki so hart raktur av koronaavleiðingunum, tí tørvurin at flyta góðs kring heimin er ikki broyttur.



Meira fæst at vita um føroysku shippingvinnuna í ársfrágreiðingini 2022 hjá Reiðarafelagnum fyri Handilsskip á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

Einki oljuvirksemi hevur verið á føroyska landgrunninum seinastu nógvu árini, og til fyri bert stuttari tíð síðan vóru lítil útlit fyri nøkrum virksemi hesi komandi árini, men nú er líkt til, at russiska innrásin í Ukraina kann fara at broyta hesi útlit í nærmastu framtíð.

*„ ... útlitini fyri oljuvirksemi eru nógv øðrvísi nú enn fyri bert einum ári síðan*

Eftir russisku innrásina í Ukraina valdar breið semja millum evropeiskar politikarar um, at londini í Evropa skulu gera seg minni bundin av gassi og olju úr Russlandi, og tað skal gerast, so skjótt tað á nakran hátt letur seg gera.

Tí er støðan at útvinna olju og allar aðrar orkukeldur í vesturheiminum nógv broytt hesar seinastu vikurnar. Stór altjóða oljufeløg høvdu lagt ætlanir um at útvinna olju nærhendis okkum á hillina, men nú hava tey tikið ætlanirnar fram aftur. Útlitini fyri oljuvirksemi um okkara leiðir eru framvegis óviss, men tey eru nógv øðrvísi nú enn fyri bert einum ári síðan, og tey fara helst at broytast skjótt hesa nærmastu tíðina.

Hóast einki oljuvirksemi hevur verið á føroyskum sjóøki seinastu árini, so hevur føroysk frálandavinna havt nógv virksemi og fingið nógvar royndir í øðrum londum hesa tíðina. Føroysk vinna kann tí bjóða allar tær tænastur, ið øll sjóvinna nærhendis Føroyum hevur tørv á, og Føroyar eru kappingarførar við okkara nærmastu grannalond, tá ið tað snýr seg um at veita alskyns tænastur til frálanda- og sjóvinnuna um okkara leiðir.

Her eru tí møguleikar hjá føroyskari vinnu, nú tað eru útlit fyri nógvari skipaferðslu framvið Føroyum komandi árini. Hesi skipini skulu viðlíkahaldast, umvælast, proviantera, bunkra, og skifta manning. Her hava føroyskar tænastu- og framleiðslufyritøkur gyltar møguleikar at bjóða seg fram, mitt í ferðslumeldrinum í Atlantshavinum.

Meira fæst at vita um føroyska sjóvinnu í ársfrágreiðingini 2022 hjá Sjóvinnufelagnum á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo

## Útlitini sera óviss í løtuni

Eftirskjálvtarnir av koronutiltøkunum merkjast framvegis við stórum avbjóðingum at útvega rávørur og vanligar vørur av ymsum slag. Nógv virksemi liggur framvegis stilt av koronaavmarkingum í Kina og londunum har um leiðir.

Prísirnir á olju og rávørum annars eru hækkaðir skjótt og nógv hesa seinastu tíðina, og russiska innrásin í Ukraina hevur sett enn meira ferð á príshækkingarnar.

Skjótt vaksandi inflasjónin er tí ein tann størsta avbjóðingin í altjóða búskapinum í løtuni.

Koronafarsóttin og eftirskjálvtarnir av koronatiltøkunum fara at rætta seg sum frá líður, samstundis sum heimurin fer at tillaga seg ein nýggjan veruleika eftir kríggið í Ukraina.

Hvussu leingi hetta fer taka og hvussu nýggi veruleikin fer at síggja út, er stóri spurningurin í løtuni.

Tí er óvissan um búskaparligu útlitini helst størri nú enn nakrantíð.



# Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Eftirskjálvtarnir av koronatiltøkunum fara at rætta seg sum frá líður, samstundis sum heimurin fer at tillaga seg ein nýggjan veruleika eftir kríggið í Ukraina. Hvussu nýggi veruleikin fer at síggja út, er stóri spurningurin, og óvissan er tí størri nú enn nakrantíð. Tilmælini frá Føroya Arbeiðsgevarafelag taka støði í føroyska samfelagnum, samstundis sum tey eru haldfør, líka mikið, hvussu konjunkturarnir hátta sær**

Vinnupolitikkurin, sum varð orðaður eftir kreppuna í fyrru helvt av 1990-árunum, eigur stóran part av æruni fyri framburðinum og vælferðini í føroyska samfelagnum í dag. Vinnupolitikkurin varð seinast dagførdur og tillagaður samfelagnum í 2005, og Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur seinastu árini fleiri ferðir mælt til, at vinnupolitikkurin verður endurskoðaður og tillagaður dagsins samfelag, men hetta er ikki gjørt enn.

Endamálið við tilmælunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er vísa politisku skipanini á ítøkilig tilmæli til skattapolitikk, arbeiðsmarknaðarpolitikk, fíggjarpolitikk, orkupolitikk, umhvørvispolitikk, útbúgvingarpolitikk o.s.fr., soleiðis at yvirskipaðu vinnupolitisku málini verða rokkin við størst møguligum smidleika.

Føroya Arbeiðsgevarafelag lýsir yvirskipaðu málini við vinnupolitikki soleiðis: *"Politiska skipanin eigur at geva vinnuni best møguligar karmar, við varandi gagnnýtslu av tilfeingi, at skapa vøkstur og virðisøking í føroyska samfelagsbúskapinum, har kapping og kappingarføri er drívmegin og reyði tráðurin í privata vinnuliga virkseminum"*

Um gott eitt ár er løgtingsval á skránni, og Føroya Arbeiðsgevarafelag fer tí at loyva sær at vísa á nøkur av tilmælum sínum til ein dagførdan vinnupolitikk. Tilmælini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, har reyði tráðurin er varandi kappingarførí, treytað av burðardyggari gagnnýtslu av tilfeingi, snúgva seg millum annað um hesi viðurskifti.

## Atgongd til skikkaða arbeiðsmegi

Eitt stig rætta vegin at útvega arbeiðsmegi, varð tikið við nýggju fast-track skipanini í november í fjør. Skipanin gevur føroyskum vinnufyritøkum betri atgongd til útlendska arbeiðsmegi frá 3. londum, umframt at skipanin styttir viðgerðartíðina og lættir munandi um umsitingina av arbeiðsloyvum.

Fast-track skipanin er komin væl við hjá føroyskum arbeiðsgevarum, men hon loysir bert ein part av avbjóðingunum við at útvega skikkað starvsfólk. Ein tann størsta avbjóðingin og forðingin fyri virkseminum hjá føroyskum arbeiðsgevarum er framvegis at útvega skikkaða arbeiðsmegi, og tí verður eisini neyðugt við øðrum tiltøkum fyri at loysa tørvin á starvsfólkum frameftir, serliga umvegis útbúgvingarskipanina.

## Góðar og viðkomandi útbúgvingar- og granskingarskipanir

At hava góðar og viðkomandi útbúgvingar- og granskingarskipanir merkir, at útbúgvingar- og granskingarumhvørvið verður lagt soleiðis tilrættis, at útbúgvingar og gransking eru viðkomandi, mennandi og virðisskapandi fyri føroyska samfelagsbúskapin og samfelagið annars.

Førleikar og menning hava alsamt størri týdning fyri nýskapan og produktivitetsvøkstur í føroysku vinnuni. Tað er tí umráðandi, at vit í Føroyum hava atgongd til viðkomandi útbúgvingar av høgari góðsku. Vit hava tørv á fólki við praktiskum, yrkisrættaðum førleikum og á fólki við útbúgvingum á akademiskum støði.

## Lægri lønarskatt

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í fleiri umførum mælt til at lækka persónliga inntøkuskattin, serliga lægri marginalskatt á lág- og miðalinntøkur. Munagóðir skattalættar koma at kosta almennu kassunum stórar upphæddir. Tí má hetta fremjast yvir eitt longri áramál í tøttum samstarvi millum land og kommunur, har vanligi inntøkuskatturin

stigvíst verður lækkaður, samstundis sum frádráttir og serskipanir verða strikað, og fleiri tænastu- og brúkaragjøld koma ístaðin.

Tað ber neyvan til at fremja slíkar umskipanir til fleiri tænastu- og brúkaragjøld, sum ikki koma at venda tunga endan niðureftir. Lægstu inntøkurnar í Føroyum rinda lutfalsliga lítið í inntøkuskatti. Skal tað vera møguligt at geva miðalinntøkunum ein skattalætta, sum verður fíggjaður við breiðari skattagrundarlagi, so verður trupult ikki at raka lægstu inntøkurnar neiliga. Tí verður helst eisini neyðugt við afturberingum til lægstu inntøkurnar.

Tað hevur harumframt stóran týdning, at skattaskipanin er soleiðis sett saman, at tað altíð loysir seg at arbeiða. Tað má ongantíð vera skattaskipanin, sum setir lønmóttakarar í eina slíka støðu, at tað fíggjarliga loysir seg betur at lata vera við at arbeiða.

## Fiskivinnu- og handilsavtalur

Handils- og samstarvsavtalur við onnur lond hava stóran týdning fyri føroyska vinnu og samfelagið annars, men í løtuni hava Føroyar bert 6 fríhandilssáttmálar við onnur lond. Hetta er munandi færri enn okkara kappingarneytar hava. ES-londini hava fríhandilssáttmálar við 70 lond uttanfyri ES. EFTA-londini hava fríhandilsavtalur við umleið 40 lond uttanfyri EFTA, umframt einstøku avtalurnar, EFTA londini hava, hvør í sínum lagi. Harumframt tørvar Føroyum fleiri veterineravtalur fyri yvirhøvur at kunna selja fiskavørurnar á summum marknaðum.

Tað eru sostatt rúm fyri nógv fleiri avtalum við onnur lond til frama fyri virðisøkingina í føroyska samfelagnum. Hetta er ikki bert galdandi fyri handil við vørum og tænastum, men eisini viðvíkjandi atgongd til at fiska í fremmandum sjógvi.

## Langtíðarætlanir og haldføri í búskapin

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at raðfestingar hjá landi, kommunum og øllum øðrum almennum virksemi yvirhøvur, verður samskipað í langtíðarætlanir, serliga á íløgusíðuni, har yvirskipaða málið er at fáa langtíðarhaldføri í føroyska búskapin, soleiðis at vit fáa eina javna og støðuga útbygging og menning av føroyska samfelagnum, ið ikki verður so ógvisliga órógvað og nervað av stutttíðar stoytum og sveiggjum í búskapinum.

## Broyta kappingaravlagandi skipanir

Tað er tørvur á fleiri tillagingum og broytingum í kappingaravlagandi skipanum á heimliga marknaðinum. Um marknaðirnir skulu vera vælvirkandi, so eiga kappingarfortreytirnar, sum føroyskir myndugleikar seta, at vera tær somu. Eitt nú er munur á persónsskattinum eftir hvørjari vinnugrein løntakarin er í, og í nøkrum vinnugreinum verða starvsfólkini tryggjað eitt minsta tímatal, um virki ikki kann bjóða nóg nógvar tímar. Eisini kunnu ymiskar treytir vera, um ein vøra verður keypt frá einum útlendskum ella einum føroyskum handli.

## Almennan eigarapolitikk

Fyri at føroyski heimamarknaðurin skal verða vælvirkandi, hevur tað stóran týdning, at tað er greitt, hvørjar uppgávur mongu almennu partafeløgini og grunnarnir skulu røkja, og undir hvørjum treytum. Hetta eigur at verða ásett í einum almennum eigarapolitikki.

Almenni eigarapolitikkurin eigur at taka støði í leiðreglunum frá OECD um góða leiðslu í almennum feløgum. Eigaraskapur skal vera í áhuga hjá tí almenna og metast skal neyvt og varisliga um endamálið við almennum ognarskapi: Maksimerar almenni ognarskapurin virðið fyri samfelagið? Er grundgevingin fyri almenna ognarskapinum greitt allýst? Og er ognarskapur og politikkur endurskoðaður?

## Støðugan politikk og tryggar karmar

Broytiliga umhvørvið hjá føroysku vinnuni ger tað avbjóðandi at leggja ætlanir frameftir. Stórar og ófyrireikaðar broytingar í lógum, kunngerðum, mannagongdum og tænastustøði gera tað tí enn meiri tvørligt og avbjóðandi hjá vinnuni at leggja ætlanir frameftir.

Tað hevði lætt um hjá vinnuni, um politisku flokkarnir megna at gera breiðar almennar langtíðarætlanir og -semjur um vinnuligu karmarnar komandi árini. Hetta hevði skapt meira støðugar karmar um vinnuliga virksemið til gagns fyri føroyska kappingarførið.

Tað merkir tó ikki, at karmarnir eru óbroytiligir. Um tað eru skilagóðar orsøkir til lógarbroytingar, ið ávirka vinnuligu karmarnar, so skal tað sjálvandi bera til at fremja hesar. Tá er umráðandi, at broytingarnar verða væl fyrireikaðar, og at viðkomandi partar verða hoyrdir og fáa høvi at gera viðmerkingar, áðrenn nakað verður sett í gildi. Harnæst er umráðandi, at vinnan fær hóskandi tíð til at fyrireika seg til møguligar broytingar.




# Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum. Fremsta uppgávan hjá felagnum er at umboða føroyskar arbeiðsgevarar mótvegis føroysku løntakarafeløgunum í lønar- og sáttmálasamráðingum, og at ráðgeva limum sínum í dagligum spurningum um ymisk sáttmálaviðurskifti á privata arbeiðsmarknaðinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag er eisini andlitið úteftir hjá føroyskum arbeiðsgevarum í almenna rúminum.**

## Limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroyskir arbeiðsgevarar og fyritøkur kunnu vera beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, ella umvegis arbeiðsgevarasamskipanir í teirra vinnugrein, sum eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Arbeiðsgevarasamskipanirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru:

- Føroya Handverksmeistarafelag
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Undir arbeiðsgevarasamskipanunum eru eisini lokal feløg, sum tí eisini eru óbeinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, umvegis arbeiðsgevarasamskipanirnar omanfyri.

Fyritøkur og arbeiðsgevarar, sum ikki hoyra undir virkisøkini hjá arbeiðsgevarasamskipanunum omanfyri, eru beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

## Uppgávur og endamál hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Ein tann størsta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at samráðast og gera sáttmálar fyri føroysku vinnuna við løntakarafeløgini á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum. Endamálið er at tryggja støðug viðurskifti og tálma lønarvøksturin á privata føroyska arbeiðsmarknaðinum til frama fyri føroyska kappingarførið.

Umsitingin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir limunum tænastur og ráðgeving viðvíkjandi spurningum um t.d. starvsfólkaviðurskifti og leiðslu, lønarsáttmálar, lógir og reglur á vinnuøkinum o.s.fr. Umsitingin hevur harumframt tætt sambond við vinnuna í øðrum londum, og virkar tí eisini sum sambindingarlið millum føroyska og útlendska vinnu.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at umboða føroyska vinnu mótvegis føroysku myndugleikunum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er hoyringspartur hjá føroyskum arbeiðsgevarum viðvíkjandi lógum og reglum, sum politisku myndugleikarnir arbeiða við at seta í verk. Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at ávirka lógarsmíðið soleiðis, at vinnuligu karmarnir tæna og ikki darva vinnuliga virksemið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er harumframt, bæði beinleiðis og umvegis hini arbeiðsgevarafeløgini, umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska vinnu. Her gera feløgini sína ávirkan galdandi, soleiðis at vinnusjónarmiðið vinna frama. Hetta skal tryggja limunum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað frameftir verður liviligt hjá fólki við fyritaksemi og hugskotum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag virkar eisini sum andlitið úteftir hjá limum sínum við at kunna og leggja fram sjónarmiðini hjá arbeiðsgevarasíðuni í almenna rúminum.

Felagið skipar javnan fyri størri og smærri tiltøkum fyri limir sínar, t.d. árliga vinnudagin og ymisk kunningartiltøk um broytingar í lóggávu, sáttmálum og tilíkum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag setir eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Meira kunning um lógir o.a. viðvíkjandi Føroya Arbeiðsgevarafelag er at finna á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

## Stjóraskifti í Vinnuhúsinum

Í februar í ár var stjóraskifti í Vinnuhúsinum. Marita Rasmussen, ið hevur verið stjóri í Vinnuhúsinum í 14 ár, hevði valt at taka av nýggjum avbjóðingum sum stjóri á Havstovuni. Nýggjur stjóri í Vinnuhúsinum er Niels Winther, ið hevur starvast í Vinnuhúsinum í 11 ár.


Marita Rasmussen

Tað er ein stórur og týdningarmikil leiklutur at standa á odda fyri føroyskum vinnulívi. Tað hevur Marita megnað framúr væl, og tað er í stóran mun henni fyri at takka, at Vinnuhúsið stendur so týðuligt og greitt í almenna rúminum í dag.


Niels Winther

Nýggi stjórin í Vinnuhúsinum, Niels Winther, hevur starvast í Vinnuhúsinum síðan 2011. Frammanundan hevði hann verið deildarstjóri í Vinnumálaráðnum. Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at Niels var sinnaður at taka hesa ábyrgd á seg, og nevndin ivast ikki í, at hann holliga og framskygt fer at føra Vinnuhúsið víðari fram á leið.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag verður vald á árliga aðalfundinum í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Í lóggávu felagsins er ásett, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.**

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag er mannað soleiðis:



### Bogi Jacobsen
*Formaður*

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutningsfyritøkuni Varðin Pelagic umframt reiðarínum Varðin. Bogi Jacobsen varð valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2014 og til formann í 2017.



### Høgni Hansen
*Næstformaður*

Høgni Hansen er stjóri í heilsøluni Poul Hansen, og nevndarlimur í fleiri øðrum fyritøkum. Høgni Hansen var nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið. Í 2011 varð Høgni Hansen valdur í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og hevur verið næstformaður felagsins síðan tá.



### Kristoffur Laksá
*Nevndarlimur*

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Kristoffur Laksá er eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



### Jóhanna á Bergi
*Nevndarlimur*

Jóhanna á Bergi er stjóri í Atlantic Airways. Áðrenn tað, var hon stjóri í flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Jóhanna á Bergi varð vald í nevndina í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2019, men hon sat eisini í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag, árini frá 2008 til 2014.



### Jón Sigurdsson
*Nevndarlimur*

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Umframt at hava verið nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag í mong ár, er hann eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



### Fróði Magnussen
*Nevndarlimur*

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT-felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum og formaður í Búskaparráðnum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



## Jens Meinhard Rasmussen

*Nevndarlimur*

Jens Meinhard Rasmussen er stjóri í Skansi Offshore og Smyril Line. Jens Meinhard Rasmussen er formaður í Reiðarafelagnum fyri Handilsskip og nevndarlimur í International Chamber of Shipping. Jens Meinhard Rasmussen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Árni Ellefsen

*Nevndarlimur*

Árni Ellefsen er stjóri í BankNordik. Árni Ellefsen er formaður í Arbeiðsgevarafelagnum hjá Fíggjarstovnum í Føroyum umframt at vera nevndarlimur í øðrum fyritøkum. Árni Ellefsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



## Odd Eliasen

*Nevndarlimur*

Odd Eliasen er stjóri í Havsbrún og partur av samtaksleiðsluni í Bakkafrost. Odd Eliasen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2017.



# Vinnuhúsið

Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreinafeløgunum í Vinnuhúsinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta fatan, at tað hevur týdning at savna føroysku vinnuna, soleiðis at vinnan fær ein sterkari samleika í samfelagnum umvegis felags umboðan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti.

Í Vinnuhúsinum verða bond knýtt millum leiðarar í vinnuni, bæði her heima og uttaneftir, tí Vinnuhúsið oftani er karmur um vitjanir uttaneftir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum, men bjóðar ymsum vinnugreinafeløgunum at húsast í Vinnuhúsinum.

Í dag húsast 14 feløg undir sama takið í Vinnuhúsinum. Fimm arbeiðsgevarafeløg og nýggju vinnugreinafeløg. Harumframt leiga Føroya Reiðarafelag og Felagið Nótaskip skrivstovur í Vinnuhúsinum.

Tey fimm arbeiðsgevarafeløgini eru:

- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Føroya Handverksmeistarafelag
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Føroya Prentsmiðjufelag
- Reiðarafelagið fyri Handilsskip

Sum nevnt aðrastaðni í frágreiðingini, so umboðar Føroya Arbeiðsgevarafelag hini fýra arbeiðsgevarafeløgini omanfyri, tær sokallaðu arbeiðsgevarasamskipanirnar, í sáttmálasamráðingum við fakfeløgini.

Einstøku arbeiðsgevarafeløgini arbeiða dagliga við at ráðgeva limum sínum við sáttmála- og arbeiðsmarknaðarspurningum, umframt at leggja til rættis arbeiðsmarknaðarmál og yvirskipaðar vinnukarmar.

Tey nýggju vinnugreinafeløgini eru:

- Havnar Handverksmeistarafelag
- Havbúnaðarfelagið
- Føroya Ráfiskakeyparafelag
- Handilsvinnufelagið
- KT-felagið
- Sjóvinnufelagið
- Samskifti
- Ráðgevarafelagið
- Ferðavinnufelagið

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri akkurát teirra vinnugrein. Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

Hesi feløgini leiga skrivstovu í Vinnuhúsinum:

- Føroya Reiðarafelag
- Felagið Nótaskip

Hesi bæði feløgini eru ikki limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag ella partar av Vinnuhúsinum annars.

MEITILBERG.COM